## Dýrt kríggj

Í USA hevur Barack Obama, forseti, biðið Kongressina játta 33 milliardir dollarar til amerikonsku krígsførsluna í Afghanistan. Tað siga keldur í verjumálaráðnum Pentagon við tíðindastobuna Reuters. Keldurnar siga, at pengarnir koma oman á tað, sum Kongressin longu hevur játtað til endamálið. Keldurnar í Pentagon siga, at talan er um eina eykajáttan. Pengarnir skulu sostatt ikki fíggja avgerðina hjá Obama at senda 30.000 hermenn afturat til Afghanistan, men eru ætlaðir til aðrar útreiðslur. Hvítu Húsini vilja ikki gera viðmerkingar til tíðindini úr Pentagon.



# Havsbrún er til reiðar at keypa fisk

**Eftir at teir tríggir dampketlarnir á Havsbrún nú hava verið til høvuðssýn og eru trýstroyndir, er virkið klárt at taka ímóti fiski aftur. Tveir írskir trolarar verða teir fyrstu, sum landa í Fuglafirði í annaðkvøld**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað verða írsku systurskipini, Father McKee og Brendelen, sum verða tey fyrstu at landa til Havsbrún, eftir at virkið hevur verið stongt fyri móttøku í einar tríggjar vikur.

Hesi skip eru ikki ókend á Fuglafirði, tí samanlagt landaðu tey nógv tær størstu nøgdirnar til virkið í farna ári.

### Høvuðssýn

Orsøkin til, at Havsbrún hevur verið stongt fyri móttøku síðan fyri jól, er, at teir tríggir dampketlarnir á virkinum hava verið til høvuðssýn.

- Ketlarnir vórðu sløktir nakrar dagar fyri jólahalguna, og tá teir síðan vóru kólnaðir, varð millum jól og nýggjárs farið undir at kanna teir. Teir vórðu trýstroyndir aftur í gjár, og sum eg havi skilt, gekk hetta sum ætlað. Meðan virkið kortini hevur ligið stilt, hava vit eisini gjørt aðrar ábøtur, nú vit høvdu høvi til tess. Men nú eru vit so klárir at taka ímóti fiski aftur, sigur Hartvig Joensen.

Fyrst í hesum árinum landaðu føroysku svartkjaftaskipini, Fagraberg og Finnur Fríði, hvør sína last í Íslandi, og á Havsbrún rokna tey við, at hevði virkið í Fuglafirði ikki ligið stilt júst tá, hevði lastin hjá í hvussu er øðrum skipinum verið endað í Fuglafirði.

So, hetta var eitt sindur óheppið.

### Trúgvir írar

Hartvig Joensen sigur, at írsku skipini koma í annaðkvøld við umleið 1200-1300 tonsum í part, og eins og á fleiri túrum í fjør og fyrraári er talan um havgølt.

- Skipini plaga at fylgjast, og tey partrola eisini ávísar tíðir av árinum, sigur hann.



*Eftir at dampketlarnir hava verið til høvuðssýn, og ymiskar ábøtur eru framdar, nú virksemið kortini lá stilt, er Havsbrún í Fuglafirði klárt at taka ímóti fiski aftur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað kann ikki annað sigast um írarnar enn, at teir hava verið rættiliga trúgvir veitarar av ráfiski til Havsbrún í langa tíð.

Hartvig sigur, at av eini samlaðari ráfiskanøgd hjá Havsbrún í fjør upp á 120.000 tons, landaðu Father McKee og Brendelen stívliga 30.000 tons. Av hesum vóru 2.200 tons sild og restin havgøltur.

- Føroyska skipið, sum var við størstu nøgdunum, var Fagraberg, sum í farna ári landaði stívliga 17.700 tons til virkið. Beint fyri árslok fór annað av írsku skipunum upp um nøgdina hjá Fagrabergi og gjørdist soleiðis okkara størsti veitari í 2009.

Hann leggur tó aftrat, at meðan meginparturin av veiðini hjá írsku skipunum er havgøltur, var høvuðsnøgdin hjá Fagrabergi svartkjaftur, sum hevur eitt størri nýtsluvirði.

### Vánalig útlit

Útlitini hjá Havsbrún í ár at fáa nóg mikið av ráfiski til sína framleiðslu eru ikki góð.

Tey bestu árini til nøgd keypti Havsbrún fleiri enn 300.000 tons, men í farna ári vórðu fleiri enn 70% av pelagisku veiðini hjá føroyskum skipum landað uttanlands.

- Av teimum 120.000 tonsunum, vit keyptu í fjør, vóru stívliga 30.000 tons havgøltur, sigur Hartvig Joensen.

Hann vísir á, at virkið roynir at útvega sær ráværu til sína framleiðslu – eisini úr londunum uttanum okkum, men hetta er ikki bara lætt, tí eitt nú handilsforðingar liggja í vegin.

- Vit kunnu heldur ikki vænta okkum tær stóru nøgdirnar av svartkjafti í ár, nú kvotan er so lítil, og spurningurin er so, hvussu vit tryggja okkum ráværuna sum er neyðug í okkara framleiðslu. Vit arbeiða við ymiskum møguleikum, leggur Hartvig Joensen aftrat.

# Tað eru tveir keyparar til havgølt

**Hartvig Joensen á Havsbrún sigur, at tað eru tveir keyparar til smáa fiskaslagið havgølt. Annar er Havsbrún; hin er í Skagen**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Havgøltur er smáur fiskur. Er slagið gott, liggur støddin millum 10 og 13 sentimetrar, men er fiskurin smáur, er longdin einar 5-6 sentimetrar. Fiskurin minnir um kongafisk í skrædúni; hann er nakað hvassur, og tí er hann eisini ringur at fáa upp úr skipinum. Neyðugt er at brúka nógv vatn, tá havgøltur verður landaður.

Hartvig Joensen á Havsbrún sigur, at tá írsku skipini hava havgølt á Havsbrún, hevur hetta verið rein veiða við ongari íblanding.

Nú svartkjaftakvotan hjá føroysku nótaskipunum er so nógv skerd, er ráfiskagrundarlagið undir Havsbrún eisini viknað.

- Vit kunnu siga, at neyð lærir nakna kvinnu at spinna, og tað er betri at gera hesar royndir enn einki at gera. Sjálvandi eru vit spentir eftir at vita, hvussu langt vit kunnu røkka við hesum fiskaslagi, sigur hann.

Hartvig Joensen vísir á, at enn er langt á mál við havgølti og framleiðslu úr hesum fiskaslagi, men teir hava havt keyparar í eitt nú Týsklandi til sína framleiðslu.

- Vit royna alla tíðina at gera vøruna betri, og í hesum liggur eitt nú at fáa saltið úr fiskinum og proteinið, sigur hann.

Hartvig Joensen vísir á, at í løtuni eru bert tveir veruligir keyparar til havgølt.

- Vit eru annar, og hin er í Skagen. Í Killysbegs í Írlandi hava teir eisini keypt eitt sindur, sigur hann.

Havsbrún hevur gjørt royndir at virka havgølt til mjøl og partvís til lýsi, tí okkurt tíðarskeið er fiskurin hampiliga feitur og ber nokso fitt av lýsi.